## VIÐMERKINGAR

# Viðmerking til býargartnaran í Klaksvík

Ella Nolsøe Petersen
*Vágur*

Segði seg hava mist málið, hevði rópt so nógv til tann spennandi dystin tórsdagin 27.1., Stjørnan-VB. Men ikki megnaðu teir allir klaksvíkingar, fleiri hundrað, at køva ogum 50-60 vágbingar, teir vóru noyddir at brúka mikrofon til at ýla í, Stjørnan, Stjørnan.

Og ikki vóru ogur sum sligin á nevið, tá Stjørnan kom framum, nei, ogur stuðlaðu ogra liði til tað síðsta bríksl, sum ogur altíð gera.

Tá vóru tað heldur nakrir klaksvíkingar, sum nakrar dagar framman undan vóru slignir á nevið, tá VB sorlaði Stjørnuna.

Men tað fúlasta var at hoyra býargartnaran í Klaksvík í Útvarpi Føroya gera gjøldur burtur úr arbeiðsloysinum í Vági.

Vóni tú hevur ringan smakk í munninum.

Heilsan

**Ein ikki arbeiðsleysur VB-stuðul, ið var við**

# Vágur, miðnámsskúli og »býrúm«

**Neyðugt at skapa "býrúm" í Vági fyri sunnara meginøki, skulu tey ungu støðast í økinum, og ein støðug menning fara fram**

Mourits M. Joensen

"Tey ungu koma ikki aftur í oynna eftir lokna útbúgving, verður sagt, tí "einki" er at koma aftur til".

Spurningurin er hvat tey skulu koma aftur til. Er einans talan um eitt arbeiðspláss, ið skal standa tøkt? Kann talan ikki verða um karmar, sum hava eins stóran týdning og eitt arbeiðspláss? Eru tílíkir karmar ikki ein fyritreyt fyri, at tey ungu vællærdu koma aftur fyri at skapa nýggjar framkomnar verkætlanir og harvið nýggj arbeiðspláss?

Hvat kom nú fyrst, eggið ella ungin?

**Arbeiði og frítíð**

Alt ov ofta síggja vit, at dentur einans verður lagdur á at skapa arbeiðspláss í útjaðaranum tá ið trupulleikar stinga seg upp, við vón um at so lagar alt seg. Tað kann vera partur av einari loysn, men er neyvan øll loysnin. Finnast ikki meira varandi loysnir, sum virka sjálvstyrkjandi fyri nýhugsan og framfýsni, so ein støðug menning fer fram, og vit ikki enda í somu støðu aftur, tá tíð er fráliðin?

Vit vita øll, at tey ungu seta alt størri krøv til karmar, sum taka hond um arbeiði og frítíð teirra. Tí er neyðugt at skapa karmar, har eitt sosialt- og mentanarligt umhvørvi gevur møguleikar fyri einum innihaldsríkum gerandisdegi.

Í londunum rundan um okkum verður alt størri dentur lagdur á júst hesi viðurskifti, tí tað er grundleggjandi vitan, at vinnulívið hevur tað einans gott, um borgarin trívist. Her verður m.a. arbeitt við verkætlanum, sum eitt nú danir kalla at skapa "býrúm", har arbeiðsplássið og frítíðin stimbra hvørt annað og skapa karmar, har ung sum eldri trívast sosialt, mentanarliga og vinnuliga.

**"Býrúm" og økismenning**

Gongur hjá okkum sum í londunum rundan um okkum, so eru økir í útjaðaranum sum eru avfólkað, hyggja vit nøkur ár fram. Hetta eru øki, har ikki ber til at skapa "býrúm". Tað er tí av størsta týdningi, at bygdirnar í sunnaru hálvu síggja tað neyðuga í at skapa "býrúm" í Vági fyri sunnara meginøki, skulu tey ungu støðast í økinum, og ein støðug menning fara fram. At síggja burtur frá hesum veruleika, og halda, at arbeiðspláss áleina skapa neyðugar karmar fyri trivnaði, er í andsøgn við royndirnar aðrastaðni.

**Vágur og "býrúm"**

Hvussu skapa vit eitt "býrúm", har lív er í, har ung trívast og støðast, eitt " býrúm", sum er eggjandi og hugkveikjandi og ein fyritreyt fyri, at framkomnar fyritøkur síggja møguleikar á staðnum?

Ein týðandi liður vit hava at arbeiða við, eru framkomnir bygningar, sum virka sum karmur um "býrúmið". Í Føroyum eru vit ógvuliga fátæk í so máta. Vit hava fáar stórar, vakrar og funktionellar bygningar, sum kunnu vera við til at mynda "býrúmið", men teir bygningar vit hava, mugu vit undir øllum umstøðum nýta við skili, og fáa sum mest nyttu burtur úr. Tí er tað av størsta týdningi, at sunnara meginøkið í Suðuroy sær møguleikarnar, sum eru í miðnámsskúlanum sum bygningi, og tað sosiala og mentanarliga umhvørvi hann kann skapa.

Miðnámsskúlin má tí síggjast í einum breiðari høpi enn bert staði, har næmingar fáa eitt prógv, fyri síðani at rýma úr oynni og ikki koma aftur. Hann skal sjálvsagt nýtast sum ein týðandi liður í "býrúminum", fyri á tann hátt at náa júst tað øvuta.

**Miðnámskúlin og "býrúmið"**

Hvørt tað er av tilvild ella tilætlað, at bygningurin er lagdur vesturi við "Vatnið", so er hetta júst rætta staðið, verður hugt eftir, hvussu londini rundan um okkum nýta tílíkar bygningar í "býrúminum".

Ein tíðandi liður í at skapa eitt "býrúm" er at skapa eitt flow av fótgangarum, súkklistum og akførum gjøgnum økið. Partvíst fyri at skapa dámin av aktiviteti, men ikki minst fyri at skapa karmar fyri avleiddum tænastuvinnum, við at draga "øll" framvið.

Tá ið tosað verður um, at skúlin liggur óhøgliga, tí koyrast skal ígjøgnum alla bygdina, so er hetta júst í andsøgn við tær leiðreglur, sum eru galdandi. Tá er ikki avgerandi at koma út úr "býrúminum" við skundi, hvør so orsøkin til tað skuldi verið, heldur øvut at skapa eitt stað, har ung sum eldri hava hug at blíva verandi.

**Miðnámsskúlin sum skúli og bygningur**

Í kjakinum um, hvørt miðnámsskúlin skal liggja í Vági ella Hovi, hevur heldur ikki verið umtalað tað sera viðkomandi í hesum kjaki, nevniliga stóra menningin á skúlaøkinum, sum fer fram í løtuni, har virtuellir skúlar stinga seg upp sum hundalond um allan heim. Til ber í dag at sita í Føroyum og fylgja útbúgvingum á hægri lærustovnum uttanlands umvegis Internetið. Menningin á skúlaøkinum er hon, at skúlin, tvs. bygningurin, gerst alt meira eitt stað, har tey ungu møtast fyri at styrkja tað sosiala og mentanarliga, meðan undirvísingin fer fram um Internetið. Hetta gevur heilt aðrar møguleikar fyri næmingin, so hesin er førur fyri sjálvur at leggja undirvísingina til rættis, men stillar samstundis stór krøv til skúlan, tvs. bygningin, at hesin stendur í røttum umhvørvi. Í hesum høpi er tað avgerandi neyðugt, at bygningurin gerst partur av einum "býrúmi", har næmingurin hevur hug at koma til sosialu og mentanarligu tiltøkini skúlin skipar fyri, har júst aktivitetir í "býrúminum" stuðla, og eru lokkandi.

**Heilsuskúlin og Fiskivinnuskúlin sum virtuellir skúlar**

Í virtuella skúlanum liggja møguleikar, sum nærum ikki eru troyttir í Føroyum, og sum kundu verið partur av 10 punkts loysnini fyri Suðuroynna, og ein loysn á hølistrupulleikanum hjá Heilsuskúlanum. Sum eina fyrstu roynd kundu landsog lokalpolitikarar í økinum virka fyri saman við verkafeløgunum, at Heilsuskúlin og Fiskivinnuskúlin vórðu gjørdir til virtuellar skúlar. Tá kundi verkafólkið havt møguleika at útbúgvi seg, ikki bert í suðri, men um alt landið, ein møguleiki, sum tey eru hildin heilt uttanfyri í dag. Undirvísingin kann tá leggjast til rættis av hvørjum einstøkum, so hon passar til gerandisdagin. Fyri verkafólkið, knýtt at fiskivinnuni, kundi tað verið við til at skapt tiltrongdan smáídnað í økinum.

**"Nakað" at koma aftur til**

Tað er at vóna, at lands- og lokalpolitikarar í sunnara meginøki, síggja møguleikarnar sum liggja í miðnámsskúlanum sum bygningi og skúla, og hyggja rundan um seg og taka til sín royndirnar, onnur hava gjørt. Um miðnámsskúlin verður nýttur, sum týðandi liður í "býrúminum" í Vági, kann hann vera við til at skapa karmar, sum menna økið sosialt, mentanarliga og vinnuliga, so "nakað" er at koma aftur til hjá teimum, ið hava hug at menna nýggjar vinnur í økinum.

# Fæst fiskur úr fiskapakkanum til loftvegis flutning?

Sv. Aage Ellefsen



Tey, sum vitja heimasíðuna www.hanstholmfiskeauti on.dk síggja skjótt, at heilt stórur munur – kanska upp í heilar kr. 20,- pr. kg – er prísurin á »blank torsk« og bara »torsk«.

Tað danir nevna blank torsk er kortini ikki annað enn vanligur toskur, sum er framúr feskur og er hagreiddur á ein framúr skynsaman hátt. At náa einum slíkum feskleika og einum slíkum hagreiðingarstøði er sjálvsagt møguligt hjá føroyskum útróðrarbátum. Eitt nú verður ikki »blanki toskurin« ísaður við vanligum ísi omaná, men heldur lagdur í bleytan ís, fyri at ístinnurnar ikki skulu seta merki í skræðuna.

Nógvir útróðrarbátar bløðga, kryvja og koyra longu sum er fiskin í ískaldan sjógv, alt í einum hann er fiskaður. Tað er gott, men ikki nokk. At eftirhyggja og eftirreinska, støddar- og góðskuskilja, eitt nú at skilja slánar, illa krøktan fisk ella fisk, iðer goggaður í ryggin frá, er eisini neyðugt. Tað gerst ikki umborð, men kann, um tað verður gjørt, geva nógv arbeiðspláss uppi á landi.

Men verri enn so allir útróðrarbátarnir ganga eins væl um, og tá so tann væl hagreiddi fiskurin á fiskamarknaðin-um mangan verður blandaður saman við fiski, sum ikki er niðurkøldur og haraft-urat kanska mangan deyður, áðrenn hann verður reinskaður, ja, so er alt líka vítt sum sítt.

Um annar ella áttandi hvør fiskur ikki heldur góðskutreytirnar hjá keyparanum, er eins feitt, og nøgdirnar hjá útróðrarbátunum eru mangan smáar, so ikki er lætt hjá landingarstøðunum at halda hvønn bátin sær.

**Tað gongur eisini ov seint fyri seg á landi!**

Tei flestu fiskamarknaðirnir halda uppboðssølu um náttina, ella í hvussu so er, so mikið tíðliga á morgni, at fiskurin, ið keyptur verður, kann fáast til høldar sama dagin, sum hann er keyptur, og í seinasta lagi dagin eftir hann er landaður.

Okkara gólvuppboðssøla verður ikki hildin fyrrenn einaferð fyrrapartin og tað er ov seint!

Afturat hesum kemur, at útróðrarfiskur mangan verður settur til viks av landingarstøðunum, um tær hava annað at gera, t.d. landa ísfiskabátar.

Úrslitið er at útróðrarfiskur, ið altíð átti at verið hin feskasti og best hagreiddi, er sera ymiskur til góðsku – og so mikið misjavnur, at eingin fult og heilt kann rokna við, at hann er »í lagi«.

**Bindur fiskapakkin fyri nýggjum møguleikum?**

Øll vita vit, at daggamal fiskur eigur at gerast hin mest eftirspurdi og eigur at uppnáa hin besta prísin frá honum, sum etur hann!

Vit vita eisini, at einasti hátturin at fáa føroyska útróðrarmanninum henda prísin, er at »blankur føroyskur toskur« og »blonk hýsa« eisini hava ein marknað og fáa ein prís hareftir. Men tað verður ikki við tí arbeiðsgongdini, sum nú er.

Mín spurningur er tí, hvørt nýggi fiskapakkin kemur at opna nýggjar møguleikar og bøta um hesi viðurskifti, gera tey verri, ella einans varðveita støðuna óbroytta.

Eg hoyrdi í útvarpinum, at fiskapakkin fyrsta dagin verður lagdur fyri løgtingið, so fyrisitingin veit í hvussu so er nú, hvat hon ætlar at løgtingið skal samtykkja.

Mín áheitan í hesum umfarinum er bert, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum ikki verður so fast bundin av lógum og reglugerðum, at hann ikki fær gingið umbønum um frávik frá ætlanum mannagongdum á møti, um skilagóð hugskot til ábøtur síggja dagsins ljós og fólk venda sær til hansara í so máta.